## Sandingar fáa nýtt bókasavn

Um ikki so langa tíð fáa heimasandsfólk nýtt bókasavn. Sands kommuna hevur eina umsókn liggjandi inni í Mentamálaráðnum um stuðul til ein slíkan bygning. Tað var annars Daniella Olsen sum gav kommununi 2 milliónir krónur til hesa ætlanina. Daniella er ættað av Sandi, men hevur annars starvast sum lærari í Havn. Kommunan ætlar at nýggja bókasavnið skal byggjast á einum staði tey nevna á Mørkini Miklu, skrivar heimasíðan bkv.fo.

## Frystigoymsla byggjast í Vestmanna

Hesa seinastu tíðina hevur rættiliga nógv virksemi verið Undir Holmsbakka í Vestmanna. Hetta er staðið, har tann nýggja frystigoymslan í bygdini skal liggja. Tað eru eigararnir av Vestmanna Fiskavirki, sum hava tikið stig til hesa frystigoymsluna, skrivar heimasíðan hjá Vestmanna kommunu. Frystiorkan verður ætlandi millum 60 og 70 tons um døgnið. Kommunan skal gera økið byggibúgvið. Bygningurin skal eftir ætlan standa liðugur um ársskiftið, og skal kunna goyma 1500 tonsum.

# Pál ber fram falskar pástandir

**Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, er rættiliga fortørnaður um, at Pál Weihe, formaður í Fyribyrgingarráðnum, ber fram falskar pástandir í fjølmiðlunum**

PUNKTGJALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í sambandi við spurningin um at økja punktgjaldið á eitt nú sodavatni, hevur formaðurin í Fyribyrgingarráðnum, Pál Weihe, úttalað seg í fjølmiðlunum um, at eisini tað sukurfría sodavatnið er vandamikið, orsakað av evninum, sum latið verður í ístaðin fyri sukur.

Men Einar Waag heldur lítið um hesar ávaringar, sum hann skýrir beinleiðis falskar.

- Pál Weihe vísir – sambært hansara egna munni – til eina italska kanning frá 2005. Men hendan kanning er síðani væl og virðiliga mótprógvað av bæði evropeisku og donsku matvørumyndugleikunum, og sukurfría sodavatnið er fullkomiliga blástemplað, sigur Einar Waag.

Hann vísir millum annað til eina frágreiðing, sum finst á heimasíðuni hjá Fødevarestyrelsen, har evnið Aspartam, ið er evnið, sum verður nýtt í staðin fyri sukur í sodavatni, verður fríkent. Hetta sama evni verður eisini nýtt í eini røð av matvørum í staðin fyri vanligt sukur.

Tað undrar eisini Einar Waag, at talan yvirhøvur er um at leggja størri punkgjald á sodavatn, og hann spyr, um politikarar hava gloymt, at MVG í sínari tíð varð innført júst fyri at sleppa undan punktgjøldum á vørurnar.



*Einar Waag heldur lítið um pástandirnar hjá Pál Weihe um søtievnini, sum vera nýtt í sodavatni í staðin fyri sukur*

Einar Waag er ógvuliga bersøgin, tá hann úttalar seg um tað, Pál Weihe hevur sagt í fjølmiðlunum.

- Tá ein slíkur autoritetur kemur við so ódokumenteraðum pástandum, so má eg spyrja meg sjálvan, um líka lítið skil er í øllum øðrum, hann fæst við, sigur Einar Waag við Sosialin.

# Fullur uttan koyrikort

**Ein maður varð tikin fyri at koyra fullur umvikuskiftið. Hann hevði heldur einki koyrikort**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vikuskiftið hevur verið rímiliga friðarligt. Sambært vakthavandi á politistøðini eru bert smávegis nevniverdigar hendingar farnar fram.

Okkurt smávegis herverk, onkur brotin rútur, og annars okkurt smávegis ferðsluóhapp. Ein bilur fór runt í morgun á Kaldbaksvegnum og endaði á takinum, men bilførarin fekk tíbetur ikki skaða.


*Løgreglan gjørdi ferðslukanningar um vikuskifti. Ein bilførari var tikin fyri at koyra við kenning, og hann hevði heldur einki koyrikort*

Annars hava ferðmátingar verið framdar á Kambsdali, og har varð ein bilførari tikin fyri at koyra 135 kilometrar um tíman, og koyrikortið varð tikið. Ein annar bilførari varð tikin fyri at koyra við kenning, og viðkomandi hevði heldur einki koyrikort.

Ein onnur syndarlig hending fór fram inni á Strondum í gjár, tá ein maður koyrdi á sjógv við bili sínum. Tá vit tosaðu við løgregluna í Runavík í morgun, høvdu teir ikki fingið fatur á øllum avvarandi, og teir kundu bert vátta, at hendingin var farin fram.

Annars hevur verið nakað av fullum fólki, sum hava sovið rúsin av sær á løgreglustøðunum kring landið.